# Fornfrøðilig rannsókn undir Porkeris kirkju

*Símun Vilhelm Arge*

Ætlanin við hesi kvøðu til Sverra Dahl, nú hann fer um tey sjeyti, er at leggja fram úrslitini av fornfrøðiligu rannsóknini undir kirkjuni í Porkeri summarið 1978.

Fari fyrst stutt at umrøða rannsóknina yvirhøvur og at lýsa tey fornfrøðiligu úrslitini undir núverandi kirkju, har leivdirnar av tveimum eldri bygningum komu undan kavi. Hesir bygningar verða nevndir ávikavist bygn. II og bygn. III. Verða bygningarnir síðan lýstir út frá teim skrivaðu heimildunum. Harnæst verða lýstir teir vansar, ið eru við at knýta tær undankomnu bygningaleivdirnar saman við tað skrivaða tilfarið. At enda verða viðgjørdir møguleikarnir fyri tíðarfesting.

*Kirkjustaðurin.*

Porkeris kirkja stendur á matr. 49 a—b. Kirkjan og kirkjugarðsøkið liggja sunnan fyri høvuðsvegin, vestur frá Ánni Miklu og oman móti fjøruni, mynd 1. Hetta lendið verður nevnt í Kirkjumýri. Høvuðsvegurin kemur eystaneftir úr bygdini, fer fram við norðaru síðu á kirkjugarðinum og sneiðir síðan suðureftir, niðan úr bygdini. Økið norðan fyri vegin, á norðaru síðu kirkjunnar, nevnist á Kumlunum. Frá vegnum og oman móti fjøruni er javnt hall á kirkjugarðslendinum. Sunnanfyri og oman í mølina er tó slætt men rættiliga vátligt.

*Fornfrøðiliga rannsóknin.*

Orsøkin til rannsóknina í Porkeris kirkju var, at kirkjuráðið ynskti eina meira tíðarhóskandi kirkju. Skuldu krøv kirkjuráðsins




Mynd 1. *Kirkja og kirkjugarðsøkið í Porkeri. Við tøttum puntum er vístur elsti parturin av kirkjugarðinum. Seinast í 1950-árunum varð hesin kirkjugarðurin víðkaður vestureftir — økið har longri er millum puntarnar.*

lúkast, var, umframt eina størri umvæling av sjálvari kirkjuni, m. a. neyðugt við einum nýggjum hitaverki. Hetta hitaverkið skuldi standa í kjallaranum, og var tað í hesum sambandi neyðugt at grava út fyri støði til ein hitablásara niður í lendið undir kirkjuni.

Av tí at siður hevur verið, at nýggjar kirkjur vórðu settar á ta gomlu grundina, um ikki onkur beinleiðis orsøk talaði fyri flyting av tí nýggja kirkjubygninginum, varð tikið stig til at Føroya Fornminnissavn fekk høvi til at kanna lendið undir kirkjuni, áðrenn arbeiðið upp á hitaverkið varð sett í verk.[1]

Útgrevstrarararbeiðið byrjaði tann 24. juli 1978 og vardi til tann 8. september s. á.[2] Undirritaði stóð fyri arbeiðinum, og hjálparmaður var Jógvan Ravnsfjall, savnsteknikari.

Rannsóknin var í sjálvari sær avmarkað soleiðis við at órógva minst møguligt at finna eitt høgligt stað at seta støðið til hitablásaran, og samstundis at fáa til vega upplýsingar um møguligar eldri bygningar á staðnum.

Av tí at tað er heldur lágt í kjallararúminum frá gólvi og upp




Mynd 2. *Yvirlitstekning yvir útgrevstrarøkini A og B.*

undir undirsløgini, og tí at lendið hellir suðureftir, varð avgjørt, at hóskiligasta økið til rannsóknina var í sunnara helmingi av kjallaranum undir kórinum, mynd 2, øki A. Seinni varð rannsóknin víðkað, soleiðis at eisini varð grivið á økinum B. Harafturat var útgrevsturin avmarkaður niðureftir við tað, at ikki var neyðugt at grava djúpari enn at tað vóru um 25 sm frá undirsløgunum og niður á hitablásaran. Sostatt má viðmerkjast, at í hvørgum av útgrevstrarøkjunum varð farið á botn, og at tað tí liggur okkurt eftir niðriundir enn, ið ikki er kannað.

Aftan á at kjallarin var tømdur fyri ymist rusk og byggiavlop, ið har hevði hópað seg upp, sást, at um allan kjallaran lá malargrót, nevastórir og minni malarsteinar, sum gólv í kjallaranum. Tó sóust størri steinar, ið stungu seg uppundan ymsastaðni. Vestast í kjallaranum, undir forkirkjuni, var tó ber mold, og var har rættiliga vátligt.

Mitt í kjallararúminum, beint undir miðgongini uppi í kirkjuni, er ein uml. 110 sm breið grótlaðing, ið styðjar upp undir undirsløgini í skipinum. Henda laðing verður her nevnd miðlaðingin.

*Fornfrøðiligu úrslitini.*

Bygn. II, mynd 3.

Eftir at fláirnar 1a og 1b, ið hoyra til núverandi kirkju, vórðu grivnar omanav, varð komið niður á størri grót blandað við smærri malarsteinum, sjóskervi, teir kalla, í mold. Hetta grótið sást skilliga at vera lagt, og er tað greitt, at hetta er seinseting (sí mynd 5, skurðirnir A-A og B-B).

Í vestara helmingi av økinum A, t. e. frá 4X til 3X, er steinsetingin ógvuliga væl varðveitt. Hvørki her ella longri eysturi á hesum øki gongur steinsetingin heilt suður í núverandi grund. Vestast á økinum byrjar steinsetingin uml. 30 sm norður frá núverandi grund. Hon heldur fram norðureftir og gongur inn undir miðlaðingina. Steinsetingin fer fram við eysturendanum á miðlaðingini og í norðurmarkið á útgrevstrarøkinum.

Í eystara helmingi av økinum, frá 2X til uml. 3,10X, er steinsetingin verri varðveitt. Her byrjar hon uml. 50 sm norður frá núverandi grund, og heldur hon bert uml. 120 sm fram norðureftir. Norðanfyri aftur, frá uml. 0,90Y til 0,30Y, er als eingin steinseting, bert ein lægd. Lægdin er fylt við reinari møl niður í uml. kotu 75—80. Tá vísti seg meira mold at vera í fylluni.

Beint fram við norðurmarkinum á øki A var tó steinsetingin aftur at síggja. Her sæst hon at hella niður í omanfyri nevndu lægd.

Evnið, ið liggur ímillum og inn yvir grótið í steinsetingini, er í vestara helmingi fast samanpressað mold íblandað smásteinar við træflísum og høgguspónum (ovasti partur av flá 2), men í eystara helminginum er tað heldur leysari, feitari mold við smásteinum.

Uppsíðan av steinsetingini liggur í kotu 51 til 57, har hon er best varðveitt, uttan tó at tað er størri munur á kotunum longri eysturi á útgrevstrarøkinum.

Skilliga sæst, at steinsetingin er slitin omaná. Nakrir av steinunum eru enntá rættiliga blankir av sliti.

Neyðugt var at taka steinsetingina upp í eystara helmingi av øki A, og tá sást, at steinarnir ikki vóru slitnir á undirsíðunum. Einki er at ivast í, at hetta slit stendst av, at steinarnir hava verið nýttir til at ganga á. Sostatt má henda steinseting týðast sum partur av gólvinum í kirkjuni, ið var undan núverandi kirkju.

Vert er at geva gætur, at millum grundina á núverandi kirkju, og uml. 80 sm norður frá henni, bæði á økinum A og B, er evnið nógv vátari og feitari enn norðanfyri. Harafturat var ræ̈ttiliga fitt av kálki íblandað moldina her í sunnara helmingi av øki A.

Viðmerkjast má, at umstøðurnar á øki B eru verri at fáa skil á enn tær á øki A, m. a. tí at ikki ber til ræ̈ttiliga at síggja eina fláskipan. Tær ovastu fláirnar í hesum øki eru at kalla burtur, og stinga steinarnir tí berir uppundan.

Hóast hetta eru nakrir av steinunum á øki B týddir sum hoyrandi til gólvlaðingina í bygn. II, m. a. tí at teir hava sama slit sum teir á øki A, og at tað tykist sum um, at tað er ovasti partur av flá 2, ið liggur oman á og millum steinarnar. Harafturat liggja teir í somu kotum.

Bygn. III, mynd 4.

Tá ið grivið varð fram við grundini á núverandi kirkju á øki A, har sum áður nevnt eingin gólvflá til bygn. II var, komu til sjóndar tríggir steinar, ið lógu á rað eystur og vestur.

Nevnt var á bls. 84 at tað var neyðugt at taka gólvlaðingina upp í tí eystara helminginum av øki A. Laðingin sást at liggja í sjóskervi og mold (flá 2). Tó gjørdist moldin feitari, djúpari vit komu. Nevnast kann, at runt um í flá 2 var fitt av kálki.

Nú flá 2 varð gjøgnumgrivin, komu vit aftur niður á størri grót, ið lá við langsíðunum suður-norður, ein grótlaðing, ið eisini gekk eystur og vestur eins og tann sunnara.

Millum hesar báðar grótlaðingarnar var smærri malargrót, ið lá tilvildarliga við leysari mold ímillum.

Tess meira vit reinsaðu millum steinarnar, tess greiðari gjørdist myndin av einum 125 sm breiðum, tvílaðaðum grótveggi.

Á norðaru síðu á hesum grótveggi gekk steinarøð, ið var javnfjar vegginum, bæði á øki A og B. Uppsíðurnar á hesi røð liggja ógvuliga javnar: í kotunum 65—67.

Skilligt er, at henda steinarøð er grund undir syll innan fyri nevnda grótvegg.

Á økinum B fer tann sunnara laðingin í grótvegginum inn undir grundina í eysturendanum á núverandi kirkju, og tann norðara laðingin tykist benda norðuryvir, fram við hesi grund.




Mynd 3. *Flatatekning 1, Bygn. II. Teknlýsing: 1. Grund og miðlaðing á núverandi kirkju. 2. Leivdir av gólvi í bygn. II.*




Mynd 4. *Flatatekning 2, Bygn. III. Teknlýsing : 1. Grund og miðlaðing á núverandi kirkju. 2. Leivdir av veggi og grund á bygn. III. 3. Fylla í veggi á bygn. III.*

Tvílaðaði grótveggurin og grundin verða at týða sum suðurveggur og grund á bygn. III, og tað tykist, at vit á øki B hava fatur á landsynningshorninum á hesum bygningi.

Av tí at avgjørt varð, at hitablásarin skuldi setast í norðara helming av øki A, og fyri at útvega tað neyðuga plássið til støðið, var neyðugt at taka grundina á bygn. III upp í hesum øki.

Grundin sást tá liggja í eini flá av tætt samanpressaðum sjóskervi í feitari mold (flá 4) (sí mynd 5, skurð C-C). Í mun til flá 2 var als einki kálk at síggja í flá 3 og 4.

Sum nevnt á bls. 84, var ein lægd í norðasta parti av øki A, beint norðan fyri grundina, ið varð tikin upp. Í lægdini vóru malarsteinar niður til kotu 75—80. Tá grivið varð djúpari í lægdini, komu størri steinar undan í kotu 79, ið tykjast stinga djúpt. Hesir steinar liggja tó órørdir, tí at mett varð, at um teir vórðu rørdir, fór tað at nerva toftaleivdirnar, ið helst liggja longri niðri. Vert er eisini at geva gætur, at fleiri av teim fløtu malarsteinunum, ið har vóru, stóðu eftir kanti niður í ta moldblandaðu fylluna. Hvussu nevnda lægd skal týðast, er tó ógreitt.

Hetta avmarkaða økið varð grivið niður í kotu 90, har vit eru djúpast, og kotu 72, har vit eru grynst. Á hesum øki er tað, at støðið til hitablásaran skal standa.

*Gripirnir.*

Her verður bert givin stutt samanfatan av teim gripum, ið funnir vórðu við rannsóknina.

Til samans vóru 19 gripanummur skrásett.

Av hesum eru seks nummur skrásett sum rútaglas. Í tveimum førum eru ávikavist seks og sjey brot tikin undir einum nummari. Umframt rútagløsini eru funnin tvey glaspetti, uttan tó at nakað nærri kann sigast um tey.

Ein myntur: FNR:1, úr kopari. Onnur síðan er prýdd við andlitsmynd, og umskriftin ljóðar: Fredericus VI Dei Gratia Rex. Á hini síðuni stendur: 1 Rigsbank-Skilling 1813. Funnin í flá 1a.

Tríggir knappar: ein úr beini, FNR:2, og tveir úr kopari, FNR: 3 og 5.

Eitt brot av kritpípuleggi: FNR:6, munnstykki. Longd: 50 mm, tvørmát: 10 mm. Funnið í flá 2.

Eitt leirílátabrot: FNR:10, síðubrot. Størsta mát: 23 mm, minsta mát: 5 mm, tjúkt: 6 mm. Evni: harðbrent fínt leir, sum á útsíðuni er grábrent, á innsíðuni er brúngult. Útsíðan er grá-glarað. Funnið í kotu 79 í lægdini norðast á øki A, sí bls. 88.

Eitt høvd, FNR:15, mynd 6. Evni: Terrakotta. Støðd: 60×60 mm. Hesin gripur er uttan iva hin merkisverdasti, ið funnin varð. Høvdið varð funnið í flá 4, undir einum av steinunum í grundini til bygn. III (sí mynd 5, skurð C-C). Tað lá niður at einum størri steini, men millum høvdið og steinin vóru leivdir av 2—3 mm tjúkkum viðarsprekum. Skilligt var, at viðurin gekk inn undir høvdið.[3] Hóast viðurin ikki tóktist brendur, vóru leivdir av trækoli at síggja við høvdið og á einum øki uml. 50 sm norður frá innaru laðingini av grótvegginum í bygn. III.

Høvdið er ikki varðveitt í fullum líki. Bert fremri helmingurin er varðveittur: andlitið frá hálsinum og upp til skallan við einum sindri av hárinum. Hvussu baksíðan hevur verið evnað, er ilt at meta um.

Høvdið er úr fínum brendum leirevni, terrakotta. Áðrenn høvdið er vorðið brent, tykist tað at hava verið tilevnað í einum formi, men smálutir so sum muður og nasagluggar eru evnaðir við hond. At eyguni onga serliga viðgerð hava fingið, kann vísa á, at upprunaliga hevur ætlanin verið, at høvdið skuldi prýðast við litum. Tó eru eingi merki eftir hesum prýði, um so hevur verið.

Ilt er at meta, hvussu høvdið skal týðast. Kanska hevur tað verið partur av eini mynd, men tað kann eins væl hava verið partur av einum relieffi. Ikki kann heldur sigast nakað um, um høvdið hevur skulað avmynda ávísan persón.

Neyvan er høvdið gjørt í Føroyum. Hetta, at høvdið er evnað í einum formi, kundi bent á mongdarframleiðslu. Myndir og relieff úr brendum leiri, ofta við gudiligum innihaldi, vórðu framleidd í stórum nøgdum í Týskalandi og Niðurlondum. Vanliga verður hildið, at teir sonevndu »beeldedruckers«, virkaðu í Niðurlondum. Eina kendastir eru teir úr býnum Utrecht.

Nær høvdið er gjørt, er eisini ilt at siga nærri. Tó verður mett úr 1400-árunum ella seinast frá byrjanini av 1500-árunum. Vert er at geva gætur, at soleiðis sum høvdið er funnið, kann ikki verða sagt

fyri vist, um høvdið upprunaliga hevur staðið inni í einum av fyrru kirkjunum á staðnum — tá møguliga sum partur av einum bønarrelieffi, ella um tað er komið uttaneftir við moldfyllu, ið er løgd á staðið, har bygn. III er reistur.[4]

Harumframt varð funnið skal av heslinøt og tvey jarnpetti, har annað má sigast at vera ein rustklumpur.

*Skrivaðar heimildir.*

Í sambandi við útgrevsturin undir Þorkeris kirkju var tað av týdningi at fáa kannað, hvørjar skrivaðar heimildir, ið til eru, sum kunnu geva okkum eina neyvari lýsing av teim bygningum, sum vit við hesi rannsókn vóru komnir niður á.

Umframt kirkjulýsingarnar í nevndarálitinum frá 1709—10[5] og einum sýni frá 1729,[6] finnast kirkjuroknskapir og kirkjusýni. Til skjals eru kirkjuroknskapir og sýni av kirkjunum í Suðuroy fyri árini 1751, 1752 og 1753. Haðan er eitt lop fram til 1804, har einki tilfar er til longur. Frá 1804 taka roknskapirnir og sýnini við aftur og ganga fram til okkara dagar. Tó verða sýnini ikki reglulig fyrr enn eftir 1834.[7]

Elsta sýni vit vita um, sum lýsir eina av kirkjunum í Þorkeri, er nevndarálitið, ið viðger kirkjuna, ið stendur í 1709.[8]

Hesin kirkjubygningur er 12½ alin 3 tummar langur. Harav er kórið 3 alin 8 tummar. Hann er 6 alin 10 tummar breiður og 6¾ alin høgur. Aftur at longdini vestur eftir mugu leggjast 2 alin. Hetta er longdin á forkirkjuni, ella »Vaabenhus«, sum skrivað stendur. Breiddin á forkirkjuni er tann sama sum á kirkjuni annars. Øll longdin verður tí 14½ alin 3 tummar.

Kirkjan er bygd úr timbri, bróstað innan og umgird av grótveggi. Hon hevur einki torn og onga klokku. Yvir altarinum eru tvey vindeygu. Um hesa kirkju fáa vit annars at vita, at hon »er vel en gammel Bygning, men dog holdt vel ved Magt«, men einki beinleiðis um, nær hon er bygd.

Næsta lýsing, ið er til skjals, er frá 1729.[9] Tann 21. juni hetta árið verður kirkjan í Þorkeri sýnað. Vit fáa at vita, at í 1724 er kirkja bygd, »opbygt A° 1724 mæst paa Sognefolkets egen Bekostning saasom den er af ringe Indkomme«.




Mynd 6, a og b. *Høvd úr terracotta (FNR:15). a: framsíða, b: baksíða.*
*Foto: Nationalmuseet, Kbh.*

Kirkjan frá 1724 er $14^{1}/_{3}$ alin long, $6^{3}/_{4}$ alin breið og 6 alin høg. Aftur at longdini skulu leggjast $2^{1}/_{2}$ alin[10] vestureftir. Hetta er longdin á forkirkjuni, ið er fyri vesturendanum á kirkjuni, og sum er eins breið og kirkjan.

Vit síggja, at kirkjan frá 1724 er økt eitt sindur í mun til ta fyrru. Nú er vorðið pláss fyri 12 stólum á suðursíðuni og 10 á norðaru síðu, móti í fyrru kirkjuni ávikavist 10 og 9.

Henda kirkjan er eins og tann fyrra bróstað og umgird av grótveggi. Tó er forkirkjan ikki bróstað, men hevur beran grótvegg. Tvey vindeygu eru í kórinum. Vindeyguni eru 1 alin høg, $^{3}/_{4}$ alin breið. Takið er takt við hálmi. Gólvið er steinsett.

Í nevndarálitinum frá 1709 varð nevnt, at kirkjan, ið tá stóð, hevði onga klokku og einki torn. Í lýsingini frá 1729 verða hvørki torn ella klokka umrødd. At henda kirkja upprunaliga einki torn hevur havt, skilst av sýninum frá 1752. Tí í hesum sýni fáa vit at vita, at um ta mundið er ein klokka keypt til kirkjuna, men at hon ikki verður nýtt, av tí at einki torn er. Longu árið eftir stendur at

lesa í roknskaparprotokollini: »Kirken med nyt Klokkehuus efter fornødenhed forsynet«.[11]

Tilfarið frá 1804 og frameftir gevur hópin av byggifrøðiligum upplýsingum — sýnini um standin, kirkjurnar hava verið í, um neyðugar ábøtur, og roknskapirnir m. a. um tilfar, ið keypt verður til hesar ábøtur. Tó er ikki pláss til á hesum sinni at lýsa hetta tilfar út í æsir. Fari bert at nevna tær upplýsingar, ið eg meti hava størstan týdning fyri byggisøgu kirkjunnar og sum kunnu lýsa teir vansar, vit seinni koma at nema við.

*Gólvið.*

Kirkjan frá 1724 hevur sum omanfyri nevnt steinsett gólv.

Miðskeiðis í 1700-árunum fara menn at tosa um at fáa timburgólv í kirkjuna.[12] Tó er tað ikki greitt, um hetta ynski verður framt tá, tí einki skrivligt er varðveitt frá seinna helmingi av hesi øld.

Tá gólvið verður umrøtt aftur, í sýninum frá 1816, er tað ógreitt, um gólvið enn er steinsett. Men í roknskapinum fyri 1838 stendur, at kirkjan »behøver nyt Gulv i Choret og Brædegulv ønskes i Forkirken«. Tá er timburgólv í kórinum, og hevur tað óivað ligið á í nøkur ár. Í 1841 verður kórsgólvið umvælt, og forkirkjan, sum hevur havt steinsett gólv inntil tá, fær nú eisini timburgólv.[13] Hvussu vorðið er við sjálvum kirkjuskipinum, er sum nevnt ógreitt í 1816. Men í 1845 er skilligt, at nú er timburgólv í skipinum, tí í hesum sýninum stendur, at »i Kirkens Skib .... er .... Gulvet ved Indgangen .... dtlig[14] fordærvet«. Um so timburgólv hevur verið í øllum skipinum ella bert í miðgongini, sum ofta er í føroyskum kirkjum um hetta mundið, er ilt at siga. Heldur ikki kunnu vit siga nakað um, hvat ár timburgólv er lagt í skipið.

*Stórviður og veggir.*

Upplýsingar um stórviðin úr teim skrivaðu heimildunum eru ógvuliga fáar. Í sýninum frá 1751 hoyra vit, at ein av undirsyllunum eigur at verða skift út. Síðan hoyrist einki aftur fyrr enn í sýninum frá 1835. Tá er tað undirsyllin á sunnaru síðu, ið tørvar umvæling. At einki hoyrist um ábøtur av tílíkum slagi í hesum langa tíðarbili, kann møguliga koma av, at so fáar skrivaðar heimildir eru varðveittar frá hesum tíðarskeiðinum.

Í 1830-árunum verður kirkjubygningurin fyri stórari broyting. Í kirkjuroknskapinum fyri 1835 stendur áhugaverd upplýsing: »Porkere Kirke har den søndre Undersøl ganske bedærvet, og da Aarsagen hertil menes at være den udenom Kirken staaende Steenmuur, er det anseet fornødent at borttage denne og give Kirkens søndre Side en nye Udklædning«. Trý ár seinni verður so grótveggurin á suðursíðuni tikin burtur og útsíðan í staðin klædd við timbri.[15]

Áhugavert er at síggja, at við hesum tiltaki verður gamli føroyski byggiháttur brotin, ein byggiháttur innan føroyska kirkjubygging, ið nýttur hevur verið síðan tíðliga í miðøld og upp í 1800-árini. Elsta dømi um hetta hava vit í kirkju 2 heima á Sandi, ið helst varð bygd í 11—1200 árunum.[16]

Nevnast kann, at hesin gamli byggiháttur um somu tíð eisini hevur fastar røtur í hinum norrønu londunum, bæði í Íslandi og Grønlandi.[17]

Nú hevur so tann nýggi siðurin tikið seg upp í Føroyum at byggja kirkjur heilt úr timbri. Dømi um henda byggisið eru tær tíggju timburklæddu bygdakirkjurnar, ið standa eftir frá tíðarskeiðinum 1829 til 1847. Einki er at ivast í, at í Porkeri hava teir viljað fylgt nýggjum siði í kirkjubygging, tí grótveggurin, ið umgirdi sjálvt timburverkið, skuldi júst verja hana betur móti veðri og vindi. Men her siga menn grótveggin vera orsøkina til, at syllin forferst.

Ymist er, ið bendir á, at hetta fyribrigdið, at suðursíðan á kirkjunum, ið upprunaliga vóru umgirdar av grótveggi, sum frá leið í summum førum varð timburklædd, áðrenn farið varð at byggja kirkjur heilt úr timbri frá byrjan. Dømi um hetta sama hava vit m. a. úr tí næstseinastu kirkjuni, ið stóð á Kirkjukletti suðuri í Vági,[18] og somuleiðis úr kirkjuni ið stóð undan núverandi kirkju heima á Sandi.[19]

Tó meti eg, at hesin spurningur er ov lítið kannaður enn til at nakað kann sigast fyri vist hesum viðvíkjandi.

Hugsandi var, at nú suðursíðan varð vorðin timburklædd, vórðu vindeygu sett í klædningin. Einki verður tó nevnt um t. d. rútaglas ella um vindeygu yvirhøvur í teim skrivaðu heimildunum í hesum sambandinum. Av tí at heimildirnar frá hesum tíðarbili eru

rættiliga nágreiniligar, mugu vit halda, at eingi vindeygu komu í suðursíðuna á hesum sinni.

Av roknskapinum fyri 1838 sæst, at tá er úthurðin á norðaru síðu í forkirkjuni, men at ynskiligt er, at hon nú verður flutt suðurum, soleiðis at sleppast kann undan kvistinum, ið er yvir hurðini, tí tað lekur so illa um hann. Í 1841 verður hurðin flutt suðurum.[20]

Tað kann tykjast løgið, at teir, sum bygdu hesa kirkju, ikki settu hurðina í vesturendan — so var kvistur heldur ikki neyðugur, eisini sjálvt um endin var úr gróti, soleiðis sum nevnt verður um kirkjuna frá 1724.[21]

*Tekjan.*

Fyrstu ferð, tekjan verður umrødd, er í 1729.[22] Tá er kirkjan takt við hálmi.

Í 1804 og tvey tey næstu árini frætta vit, at eingin nævur er at fáa við handilin. Av tí at tað tykist sum at long tíð fer at ganga til nævur fæst aftur, verða teir í 1806 noyddir til at tekja við hálmi.[23]

Í 1818 verður kirkjan takt við nævur,[24] og hereftir verður nævur javnan keypt til ábøtur. Men í 1831 er tekjan aftur í so ringum standi, at neyðugt er at tekja heilt av nýggjum. Undantikin er tó tekjan yvir kórinum.[25]

Soleiðis sum tekjan verður umrødd í sýninum frá 1804, er einki at ivast í, at tá liggur nævur á tekjuni. Tí má kirkjan verða takt við nævur einaferð í tíðarbilinum 1729—1804. Óvist tó nær.

Í 1843 verður sagt, at »Porkere Kirke er i god Stand«, og er roknskapurin hetta árið váttaður av prestinum O. F. C. Jørgensen í 1844. Hóast hetta, verður sagt í roknskapinum árið eftir, at kirkjan er »gammel og brøstfældig«. Henda roknskap váttar nýggi suðuroyarpresturin Andreas Djurhuus.

Tá kirkjan verður sýnað sama árið, meta sýnismenninir kirkjuna at vera í so vánaligum standi, at tað beinleiðis er vandamikið fyri fólk at fara undir at umvæla kirkjuna og harafturat ov kostnaðarmikið. Mæla teir tá til, at hon verður niðurtikin. Hesum játtar Djurhuus, prestur, og sigur hann um kirkjuna, at »Den er gammel og for liden for Menigheden«.[26] Við próstasýnið sama árið verður



Mynd 7. *Steinurin ið liggur í túninum við inngongdina til núverandi kirkju.*

kirkjan vrakað,[27] og í 1847 verður nýggj kirkja bygd, tann sum enn stendur í Porkeri.

Tá hon er komin undir tak, verður tilfarið úr gomlu kirkjuni selt á uppboði fyri 95 rbd. 80 sk.[28] Poul Jacobsen, Poul á Miðgerði, á Økrum, skal hava staðið fyri arbeiðinum upp á nýggju kirkjuna. Søgn er, at hann og synirnir báðir, Jákup og Poul Johannes, ið eisini vóru við í arbeiðinum, fingu viðin úr gomlu kirkjuni sum arbeiðisløn, og skuldi viðurin verða nýttur til at byggja sethús av á Økrum, sum standa uppi enn.[29]

*Tíðarfesting.*

Tíðarfestingin av bygningaleivdunum, ið vit við hesa rannsókn komu fram á, er ikki uttan vansar.

Søgn er, at tríggjar kirkjur hava staðið á hesi somu grund.[30] Við inngongdina til núverandi kirkju liggur flatur steinur við íhøgdum

árstali: 1777, mynd 7. Søgnin sigur, at hetta árið varð kirkjan frammanundan hesari bygd, og skal steinurin upprunaliga hava staðið yvir durunum í tí kirkjuni, soleiðis at árstalið var sjónligt.

Eftir hesum at døma, skuldi tað verið greitt, at bygn. II er bygdur í 1777. Bygn. III skuldi so verið tann kirkjan, ið sýnið frá 1729 nevnir er bygd í 1724.

Av tí at sagnir ikki eiga at verða nýttar til beinleiðis tíðarfestingar, fari eg niðanfyri at royna at greina, hvat heimildartilfarið, bæði tað fornfrøðiliga og tað skrivaða, sigur tíðarfestingini viðvíkjandi.

Fyrst mugu vit gera okkum greitt, hvør týdningur, ið leggjast kann í steinin við íhøgda árstalinum.

Eg meti, at tá ið hetta ikki hevur verið gravsteinur, kann hann hava samband við sjálvan kirkjubygningin. Onkur serlig orsøk má hava verið til at árstalið stendur í honum. Um hann vísir á eina nýbygging hetta árið, er ilt at siga. Hann kann eins væl t. d. vísa á eina høvuðsumvæling, ella kanska okkurt heilt annað.

Um tað fornfrøðiliga heimildartilfarið kann nevnast, at í flá 2, undir gólvinum til bygn. II, varð funnið brot av kritpípuleggi, FNR:6. Kritpípuleggurin, ið ikki sjálvur kann tiðarfestast, vísir, at gólvið neyvan kann førast langt aftur í tíð, t. e. til einaferð eftir at fólk er farið at roykja her á landi, neyvan fyrr enn eftir 1600.

Hvat bygn. III viðvíkur, so lá høvdið, FNR:15, undir grundini til henda bygning. Nevnt varð á bls. 89, at tað ikki er óhugsandi, at høvdið er úr seinari miðøld. Men tað kann tó eisini vera yngri. Á ein ella annan hátt er tað komið í moldina. Helst eftir at tað ikki hevur verið nýtiligt longur. Hvussu ella nær, kann einki verða sagt um. Tó má tað hava verið, áðrenn bygn. III er tikin í nýtslu. Leysliga kundu hesir báðir gripir bent á, at tað hava verið eftirtrúbótar kirkjur, einahelst úr 16—1700-árunum. Neyvari tíðarfesting gevur fornfrøðiliga tilfarið ikki.

Venda vit okkum tí til tær skrivaðu heimildirnar.

Tær eru nógv verri varðveittar fyri kirkjurnar í Suðuroynni enn tær norðanfyri. Tíverri er tað júst tilfarið, ið viðvíkur kirkjubygningunum frá 16—1700-árunum, ið so at siga trýtur heilt.

Í nevndarálitinum fáa vit at vita, at í 1709 stendur ein kirkja,

ið sum áður nevnt »er vel en gammel Bygning«, sí bls. 90. Henda kirkja kann tí vera bygd einaferð í 1600 árunum.

Í lýsingini frá 1729 stendur, at í 1724 er ein kirkja bygd, sí bls. 90. Uttan iva verður kirkjan frá 1724 bygd í staðin fyri hana, ið umrødd er í nevndarálitinum.

Men hvussu so? Verður kirkjan frá 1724 standandi heilt til 1847, tá núverandi kirkjan verður bygd? Ella kunnu vit líta á tað, ið søgnin sigur um steinin við íhøgda árstalinum 1777, at tá er ein nýggj kirkja bygd?

Tó, um hugt verður at teim skrivaðu heimildunum, ið varðveittar eru, er so nakað í teim upplýsingum, tær geva um kirkjur har á staðnum, ið kundi bent á, at nýggj kirkja veruliga er bygd í 1777? Undir viðgerðini frammanfyri, bls. 92, av teim skrivaðu heimildunum, er nomið við nakrar ávísar bygningapartar, ið hava verið fyri ymiskum broytingum í seinna helmingi av 1700-árunum. Her er nevnt, at tað, at einki hoyrist um hesar broytingar, stendst av, at einki skrivað tilfar er til longur frá hesum tíðarskeiði. Tað er hugsandi, at hesar broytingar standast av eini nýbygging einaferð í nevnda tíðarskeiði, t. d. í 1777. Men tað er tó ikki avgjørt neyðugt við eini nýbygging fyri at fáa hesar broytingar framdar. Tað kunnu eins væl hava verið umvælingar. Tá ið hurðin varð umrødd, bls. 94, varð sagt, at í 1838 hevur vesturendin helst verið grótlaðaður. Ein kundi so spurt, um hetta er sami grótveggur, ið nevndur verður í lýsingini frá 1729, og sum enn stendur uppi? Heldur ikki hesum spurningi ber til at svara.

Samanumtikið má sigast, at vit við upplýsingum úr teimum skrivaðu heimildunum, ið varðveittar eru til dagin í dag, ikki fáa prógvað, at verulig nýbygging er farin fram í Þorkeri í 1777 ella í seinasta helmingi av 1700-árunum yvirhøvur.

Eitt annað er so, hvat vit vita aðrastaðni frá úr Føroyum um, hvussu leingi kirkjurnar í 1700-árunum vanliga hava staðið. Presturin Landt, ið var í Føroyum í 1790-árunum, sigur t. d. í bók síni um Føroyar, har hann hevur stutta umrøðu av kirkjunum, at við góðum eftirliti kunnu kirkjurnar standa í 60 til 80 ár, hóast tað í hesum tíðarbili er neyðugt við ymiskum ábótum.[31] Hetta tíðarbilið samsvarar at kalla eisini við tað, vit t. d. vita úr kirkjuroknskaparbókunum fyri Sands kirkju.[32]

Við hesum í huga, sammett við steinin við árstalinum 1777, og at kirkja varð bygd í Þorkeri í 1724, má ásannast, at aftan á hesi fimti og trý árini, hevur kirkjan havt ymiskar ábøtur fyri neyðini, ja, kanska hevur verið neyðugt at byggja nýggja kirkju.

Tað er nú vorðið greitt av tí, ið omanfyri er nevnt, at við teim fáu skrivaðu heimildunum, vit hava í dag, ber ikki til í hesum førinum beinleiðis at knýta tað skrivaða tilfarið saman við tað fornfrøðiliga.

Hetta fær tí ta avleiðing, at um árstalið á steininum og søgnin tala satt, so er greitt, at bygn. II er tann bygningur, ið reistur verður í 1777, og bygn. III og kirkjan frá 1724 eru sami bygningur. Men um so er, at árstalið í steininum bert vísir til eina høvuðsumvæling, har gólvlaðingin í bygn. II verður nýtt aftur eftir umvælingina, tá er harafturímóti bygn. II og kirkjan frá 1724 sami bygningur, men bygn. III er tann kirkjan, ið lýst verður í nevndarálitinum í 1709, og sum nevnt helst er bygd einaferð í 1600-árunum.

Hvørt sum er, meti eg, at hyggjuráðini fyri at greina hesar her umrøddu vansar, eru framhaldandi fornfrøðiligar rannsóknir á staðnum. Hetta verður tó neyvan í bræði.

*Endi.*

Við rannsóknini hevur eydnast at vísa á, at kirkjustaðurin í Þorkeri, í Kirkjumýri, er gamal. Leivdir av tveimum kirkjubygningum frá 16—1700-árunum eru funnar undir núverandi kirkju. Hvussu gamal kirkjustaðurin er, kann av góðum grundum ikki verða sagt, bæði tí at fornfrøðiligu leivdirnar ikki kunnu tíðarfestast fyri vist, og eisini tí, at als ikki varð farið á botn á útgrevstrarøkinum, har leivdir eftir uppaftur eldri virksemi á staðnum komu til sjóndar.

Í hesum sambandi er vert at nevna, at ta tíð, vit vóru á staðnum, varð tað okkum greitt, at leivdir eftir virksemi av fólki eisini vóru at síggja á økinum uttan um kirkjuna. Hvørja ferð ein grøv verður grivin í nýggjara parti av kirkjugarðinum, vestan fyri kirkjuna, og sum ikki var umgrivin, áðrenn hann varð tikin í nýtslu, koma menn fram á brent, hitasprongt malargrót. Ikki bert inni á sjálvum kirkjugarðinum, men eisini uttan fyri hann, niðri í mølini fyri sunnan,

sæst hitasprongt malargrót og viðarsprek í mónum, ið har stingur fram í ljósmálan. Tá hitasprongt grót verður funnið í einum ávísum øki, verður tað vanliga tikið sum tekin um forna búseting á staðnum.

Tí er tað at vóna, at þorkerningar í framtíðini fara væl, ikki bert um núverandi kirkju, sum er hin einasta, ið eftir er av sínum slag í Suðuroynni, men ikki minni um lendið uttan um kirkjuna.

## VIÐMERKINGAR

1. Undirritaði veitir í hesum sambandi kirkjuráðnum í Þorkeri bestu tøkk fyri sýnda vælvild. Somuleiðis takki eg Sjúrði Jensen, klokkara, fyri veitta hjálp undir rannsóknini.
2. Rannsóknin hevur savnsnummarið 4466 í skrásetingarsavni Fornminnissavnsins.
3. Viðarsprekini eru kannað á Naturvidenskabelig Afdeling, Nationalmuseet. Viðurin er av nálatræi, uttan tó at nærri kann sigast av hvørjum slagi. NM VIII, j.nr.: A 5470 AE, dagf. 19.06.79.
4. Henda framløga av høvdinum er grundað á upplýsingar frá Tage E. Christiansen, museumsinspektøri, Nationalmuseet, Kbh., í brævi, dagf. 15.11.79. Honum veiti eg mína bestu tøkk fyri stórt beinasemi. Sí eisini Wilm 1929, bls. 80.
5. Kommissionsbetænkningen 1709—10, útg. Tórshavn 1934, bls. 120—121. Hereftir stytt Komm.bet.
6. Siuns-Forretning ofver Alle Færøers Kircher. Hereftir stytt Siuns-Forretn.
7. Partar av tí nýtta tilfarinum, ið er á Landsarkivet for Sjælland, Kbh. eru fingnir í ljósriti til Landsskjalasavnið í Tórshavn av frúnni Onnu Fíu í Vági. Frú Lisbeth Petersen, Tórshavn, reinskrivaði tilfarið og John Davidsen, fyrrverandi kennari, Tórshavn, var góður í ráðum tá skjalateksturin var torlisin. Teimum verður veitt besta tøkk.
8. Komm.bet., bls. 120.
9. Siuns-Forretn.
10. Talið er torlisið. Skal tó helst lesast sum $^{1}/_{2}$.
11. Kirkjuroknskaparbókin fyri 1753. Hereftir stytt KRB.
12. Kirkjusýni fyri 1751. Hereftir stytt KS.
13. KRB 1841.
14. Ólesandi.
15. KRB 1838.
16. Krogh 1975, bls. 35—36.
17. Krogh 1976, bls. 306—308.
18. Andreasen, bls. 47.
19. Krogh 1975, bls. 45.
20. KRB 1841.

21. Siuns-Forretn.
22. do.
23. KS 1804, 1805 og 1806.
24. KRB 1818.
25. KRB 1831.
26. KRB 1845.
27. KRB 1846.
28. KRB 1848.
29. Vestergaard 1975, bls. 15 og 43. Vestergaard 1979, bls. 23. Pedersen, bls. 3.
30. Vestergaard 1975, bls. 43.
31. Landt 1965, bls. 54.
32. Krogh 1975, bls. 26.

## ÓPRENTAÐAR HEIMILDIR

Landsskjalasavnið Tórshavn: Kirkeregnskabs Protocol for Suderø Præstegjæld 1815—74.

Føroya biskupur: Kirkesyn paa Færøerne 1834—1884.

Landsarkivet for Sjælland, Keypmannahavn: Siuns-Forretning ofver Alle Færøers Kircher, Bispearkivet.
Kirkeregnskaber for Suderø. div. år 1751—1839, Sjællands Stiftsøvrighed. D.IV. Færøske Kirker. S 11, R 5, C 4.

## PRENTAÐ HEIMILD

Kommissionsbetænkningen 1709—10 ang. Færøernes Tilstand ved Kongens Overtagelse af Enehandelen paa Færøerne. Tórshavn 1934.

## BÓKMENTIR

Andreasen, Poul: Úr Vágs søgu, Vágur 1977.

Krogh, Knud J.: Seks kirkjur heima á Sandi. Mondul nr. 2, 1975, Tórshavn, bls. 21—54.
Om Grønlands middelalderlige kirkebygninger. Minjar og menntir. Afmælisrit helgað Kristjáni Eldjárn. Reykjavík 1976, bls. 294—310.

Landt, Jørgen: Forsøg til en Beskrivelse over Færøerne. Kiøbenhavn 1800. Tórshavn 1965.

Pedersen, Sofus: Hugskot um kirkjur. Kirkjutíðindi, nr. 2, februar 1975, 83. árg., bls. 3—4.

Vestergaard, Elsebeth: Feðgarnir Miðgerða Poul og Poul Johannes. 1975.
Ein mynd av Økrum. Mondul nr. 2, 1979, Tórshavn, bls. 22—23.

Wilm, Hubert: Gotische Tonplastik in Deutschland. Augsburg 1929.

## EFTIRMÆLI

Síðan handritið til hesa grein varð skrivað, er hent tað, at skjøl, sum vit einki hava vitað um, nú eru komin fram í ljósmálan.

Í september 1980 fekk Føroya Landsskjalasavn handaða gávu frá íslendska landsskjalasavninum. Hetta eru skjøl Føroyum viðvíkjandi, sum har hava verið goymd

Millum hesi skjøl eru m. a. kirkjuroknskapir og kirkjusýni frá árunum 1709—20, 1722 og 1734. Fyri suðuroyarkirkjurnar hevur hetta týdning, tí sum víst er á í greinini, er so lítið varðveitt av skrivaðum heimildum frá 1700-árunum úr Suðuroy.

Tó, hesi skjøl geva ongar nýggjar upplýsingar, ið nærri kunnu lýsa teir vansar, vit í hesi grein hava nomið við.

oktober 1980


## SUMMARY

The paper deals with the results of an archaeological research made on the site of the church in Porkeri, Suðuroy, built in 1847.

Remains of two older churches daiting back to the 17th and 18th century were found under the present church floor.

Though the architectural history of the preceeding churches, mentioned in the written sources, is examined, it is not possible to give an exact dating of the churches, because written sources from the 18th century are scarce and therefore they can not be linked with the archaeological evidence.

It is worth noting that because of the limitation of the research the excavation did not go as far down as to unearth older remains which were observed.

Also it should be mentioned that burnt, heat-cracked stones are found in the western part of the cemetary whenever a new grave is dug and on the beach south of the church, indicating ancient settlement.


Mynd 5. *Tvørskurðirnir A-A, B-B, C-C og D-D. Teknlýsing: 1. Grund og miðlaðing á núverandi kirkju. 2. Leivdir av gólvi í bygn. II. 3. Leivdir av veggi og grund á bygn. III. 4. Fylla í veggi á bygn. III.*

*Skurðlýsing: Flá 1a: leysur sjóskervur, møl, høgguspønir, nævur og dust. Flá 1b: fastari flá av møl, fínum sandi og smásteinum, annars rættiliga lík flá 1a. Flá 2: ovari partur: hart samanpressað turr mold íblandað smásteinar við træflísum, høgguspónum og skelsandi. Liggur innyvir og ímillum grótið í gólvlaðingini á bygn. II. niðari partur: samanpressaður sjóskervur í mold og skelsandi. Niðast í flánni varð moldin feitari. Klumpar av kálki vóru at síggja runt um í hesi flá. Flá 3: feit mold íblandað størri møl. Flá 4: tætt samanpressaður sjóskervur í feitari mold.*